# Skotbardagi í Havn

**Skot gingu av í Magnus Heinasonargøtu í Havn mikumorgunin, eftir at løgreglan varð boðsend eftir einum manni, sum ætlaði at taka lívið av sær. Við 20 metra frástøðu skeyt hann við høglbyrsu eftir løgregluni, sum skeyt afturímóti. – Løgreglufólkini vóru í lívsvanda, og tí skutu tey beinleiðis eftir manninum, sigur Jón Klein Olsen, varapolitikommissærur.**

LØGREGLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*




*Per Skov Christensen, løgreglumaður, kannar skaðan, sum løgreglubilurin fekk eftir at ein maður mikumorgunin skjeyt eftir politinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Klokkan 06.09 mikumorgunin fekk løgreglan í Havn boð um at ein 25 ára gamal maður, búsitandi í Magnus Heinasonargøtu í Havn, var um at gera av við seg sjálvan við eini byrsu. Tevir politistar fóru á staðið, maðurin kom út á trappuni við byrsuni, men illa gekk at fáa hann at geva seg yvir. Løtu seinni kemur ein triðji løgreglumaður á staðið.

25 ára gamli maðurin situr alla tíðina við byrsuni, meðan løgreglufólkini royna at fáa hann at broyta meining. Hann er drukkin, hevur brennivín hjá sær, og er tíðiliga ikki væl fyri sálarliga. Hann situr á eini trappu, og 20 metrar frá honum standa løgreglufólkini. Tvey standa aftan fyri eitt húsahorn eitt aftan fyri ein løgreglubil, sum stendur parkeraður við hornið til Dr.Jakobsensgøtu. Brádliga tekur maðurin høglbyrsuna upp, siktar, og skjýtur beint móti løgreglufólkunum. Skotið brestur í bakrútin og vinstra bakstølpa á løgreglubilinum, sum sostætt gerst beinleiðis skjøldur hjá løgreglufólkunum.

– Í hesi løtu eru løgreglufólkini beinleiðis í lívsvanda. Tann eini stendur nakað aftanfyri, men tvey av løgreglufólkunum kundi hann tað sama rakt, tí hann skjýtur við skørpum eftir teimum, greiðir Jón Klein Olsen, varapolitikommissærur, frá. Hann kom ikki á staðið fyrr enn eftir hendingina, men hevur síðan fingið eina frágreiðing frá løgreglufólkunum á staðnum.

– Eftir at hann hevði latið skotið av, gjørdu løgreglufólkini av at skjóta afturímóti, ikki eitt ávaringarskot, men fyri at raka hann í beinið, og á tann hátt steðga honum. Tey síggja, at hann er í holt við at løða byrsuna av nýggjum, og renna tá fram ímóti honum, samtíðis sum tvey skot verða latin av. Skotini raka tó ikki mannin, men ein stólpa, beint við har hann situr. Áðrenn maðurin fær løtt byrsuna av nýggjum eydnast tað løgreglufólkunum at leggja hann í hondjørn.

### Løgreglufólk í lívsvanda

Jón Klein Olsen sigur, at tað altíð er síðsta loysn hjá einum løgreglufólki at skjóta eftir einum persóni. Men hann er ikki í iva um, at tað var neyðugt í hesum føri. Maðurin var vápnaður, hevði longu skotið eitt skot eftir løgreglufólkunum, og var í holt við at løða av nýggjum. Hann heldur tí, at avgerðin um at skjóta eftir manninum, var tann einasta rætta.

– Løgreglan kann ikki rýma av staðnum, tá tað gerst vandamikið. Tað er okkara ábyrgd at tryggja, at maðurin ikki ger skaða á seg sjálvan og onnur, og hann mátti heldur ikki sleppa at reika um í býnum við byrsuni. Tí meti eg, at allir reglar eru fylgdir, og at løgreglufólkini gjørdu tað rætta í hasi støðuni, sigur Jón Klein Olsen. Hann vísir á, at tað seinni vísti seg, at maðurin veruliga var í holt við at løða byrsuna av nýggjum, og hann hevði eisini fleiri patrónur hjá sær. Jón Klein Olsen hevur verið politistur í høvuðsstaðnum síðan 1981, men minnist ikki á nakra aðra hending, har løgreglan hevur verið noydd at skjóta eftir einum persóni.

– Tað er altíð síðsti møguleiki hjá einum løgreglufólki at skjóta eftir einum persóni, men í hesum føri vóru allir aðrir møguleikar royndir, og tí høvdu vit ikki annað val, sigur Jón Klein Olsen.

### Støðan hættislig

Tað tók ein góðan hálvan tíma, frá tí at løgreglan kom á staðið, til tann 26 ára gamli maðurin varð lagdur í hondjørn. Hesa løtuna var støðan hættislig, og løgreglan valdi tí at ávara íbúgvar í grannalagnum við Magnus Heinasonargøtu í Havn um ikki at fara útum.

Eisini vóru bilar og fólk, sum ætlaðu sær framvið har, biðin um at halda seg burtur. Men av tí at hendingin fór fram rættuliga tíðliga um morgunum, áðrenn klokkan sjey, var lítið av fólki í økinum. Jón Klein Olsen metir, at tey trý løgreglufólkini á staðnum høvdu so mikið tamarhald á støðuni, at vandi ikki var fyri at maðurin skuldi gera skaða á onnur. Men sjálvi vóru løgreglufólkini í lívsvanda, tá maðurin lat skotið av móti teimum.

### Eru fyrireikað

Hendingin mikumorgunin er aðruferð í tveir mánaðir, at skotið verður eftir løgreglufólki í høvuðsstaðnum. Fyrru ferð var við Sundsvegin ein leygarmorgun tíðliga í juli, tá ein maður við byrsu fór at skjóta eftir løgregluni.

Jón Klein Olsen sigur, at løgreglan er fyrireikað til at tílíkt kann henda. Hann vísir á, at løgreglufólkini hava eina góða útbúgving, sum ger tey før fyri at klára tílíkt, og tvær ferðir um árið vera venjingar gjørdar, har fólkini verða sett í støður, har skotið verður eftir teimum. Harumframt ganga øll løgreglufólk í Føroyum við revolvara.

Løgreglan hevur fastar mannagongdir, tá løgreglufólk koma í vandastøður. Jón Klein Olsen greiðir frá, at løgreglufólk eru vand til at halda høvdið kalt, meðan hendingar sum tann mikumorgunin fara fram, men sjálvandi eru tey í ávísum føri skelkaði skelkaði aftaná. Tí verður altíð gjørd ein sálarlig eftirmeting, har tosað verður við einstaka løgreglufólkið um hendingina. Vísir tað seg eftir eina tíð, at hendingin framvegis melur í høvdinum hjá løgreglufólkinum, so hava tey eisini møguleika fyri sálarligari hjálp frá serfrøðingi.




*Løgreglufólk eru vand til at handfara slíkar støður, sum tey komu í mikumorgunin. Men neyðugt er altíð at tosa um hendingarnar aftaná, sigur Jón Klein Olsen, varapolitikommiserur, sum her tosar við eitt av løgreglufólkunum, sum var í skotríðini mikumorgunin*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*



Sjónarvitni:

# Sá og hoyrdi skotini bresta

**Fólk í grannahúsunum í Magnus Heinasonargøtu í Havn vaknaðu mikumorgunum til eina hending, sum flestu bara kenna úr útlendskum spenningsfilmum, ein skotbardaga millum ein ungan mann og løgregluna. – Tað er óhugnaligt, at tílíkt skal henda í Føroyum, greiðir eitt sjónarvitni Sosialinum frá.**

LØGREGLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Skotið frá høglbyrsuni hjá tí 25 ára gamla manninum brast í bakrútin og vinstra stólpa á løgreglubilinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Eg vaknaði um hálvgum seks tíðina við at tað var nakað av larmi og rópi í grannalagnum – tað eru vit so von við, men kortini valdi eg at fara upp at hyggja. Tá sá eg, hvat var í umbúna. Ein ungur maður situr á eini trappu í grannalagnum, hjá sær hevur hann tvær fløskur av brennivíni, og so eina byrsu. Skamt burturfrá, aftanfyri eitt húsahorn, standa tríggir vápnaðir politistar. Soleiðis greiðir eitt sjónarvitni frá. Sjálv er hon búsitandi í grannalagnum, har hendingin mikumorgunin fór fram.

Lítla løtu seinni hoyrir hon løgreglufólkini tosa sína millum um, at ein teirra skuldi fara runt hornið, og á tann hátt kanska koma á tal við unga mannin við byrsuni, kanska fáa byrsuna frá honum. Við eitt reisist maðurin og fer yvir á eina aðra trappu at seta seg. Byrsuna hevur hann framvegis við sær. Sjónarvitnið, Sosialurin hevur tosað við, fer úr vindeyganum aftur.

Telefonin ringir. Tað er løgreglan sum biður øll í grannalagnum um at halda seg innandura, tí tað kann vera vandamikið at fara útum. Ein maður situr við byrsu, og ilt er at meta um, hvat hann kann finna uppá. Eisini verða fólk, sum eru tíðliga á fótum henda mikumorgun, biðin um ikki at halda seg burtur frá grannalagnum við Magnus Heinasonargøtu.

Kvinnan hevur ikki meira enn lagt seg aftur, so hoyrir hon eitt skot smella, og við eitt er nógvur gangur uttanfyri. Hon fer uppaftur. Skotið frá høglbyrsuni vísir seg at hava rakt bakrútin á løgreglubilinum. Við eitt sær hon ein løgreglumann renna móti trappuni, har ungi maðurin situr við byrsuni, og samtíðis skjýtur hann eitt ávaringarskot móti manninum. Eitt skot hoyrist afturat, eisini frá løgregluni. Hon sær ikki mannin við byrsuni. Men úr stovuni hoyrir hon løgreglufólkini tosa um, at ikki er neyðugt kortini at fáa sjúkrabil á staðið. Maðurin er handtikin. Løtu seinni ringir telefonin aftur. Tað er aftur løgreglan, hesaferð fyri at boða frá, at vandin er av, og at maðurin er handtikin. Klokkan er nú næstan sjey, tað er mikumorgun, og gerandisdagurin kann byrja.

– Tað er óhugnaligt, at tílíkt kann henda í Føroyum. Hugsa tær, um onkur av tilvild var komin framvið, ella var farin út um dyr, áðrenn løgreglan fekk ávarað. Hvat kundi tá ikki hent? Og tað er eisini víst, at maðurin siktaði og skeyt eftir løgreglufólkunum, greiðir sjónarvitnið frá.

– Ein hevur eitt sindur trupult við at skilja, at tílíkt kann henda í Føroyum. tað er jú ikki so langt síðan, at ein annar maður hótti við byrsu í høvuðsstaðnum, sigur hon og sipar til hendingina við Sundsvegin í Havn fyri tveimum mánaðum síðan, tá ein maður gekk og hótti við byrsu. Eisini ta ferðina varð skotið eftir løgregluni.



*Fleiri høgl raktu løgreglubilin, sum eitt av løgreglufólkunum fjaldu seg aftanfyri.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Drápsroynd móti løgreglumanni

**Bergleif Brimvík, leiðari á Kriminaldeildini, metir hendingina mikumorgunin vera sera álvarsliga, og málið verður mett sum ein drápsroynd móti løgreglumanni. Serfrøðingur úr Danmark kemur nú at kanna málið.**

LØGREGLA
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tann 25 ára gamli maðurin, sum skeyt eftir løgregluni mikumorgunin, skuldi seinnapartin mikudagin í grundlógaravhoyring, har løgreglan fer at biðja um at sleppa at hava hann í varðhaldi, meðan málið verður lidugt kannað.

Økið við Magnus Heinasonargøtu í Havn er byrgt av, og mikudagin hevur løgreglan avhoyrt vitni í málinum. Bergleif Brimvík, leiðari á Kriminaldeildini, hevur eisini boðsent einum serfrøðingi frá Ríkispolitinum í Keypmannahavn, sum skal staðfesta skotvinklar osv. Kriminalløgreglan tekur málið í størsta álvara, og í løtuni verður tað mett sum ein drápsroynd móti einum løgreglumanni.

– Tað er greitt, at tá ein maður skjýtur eftir einum løgreglumanni frá 20 metra frástøðu, so er tað álvarsligt, sigur Bergleif Brimvík. Hann sigur, at danski serfrøðingurin m.a. skal fastleggja, hvussu stórur vandin var fyri, at løgreglufólkini vóru rakt at skotunum.

### Eisini eitt neyðarróp

Bergleif Brimvík sigur, at fyribils verður málið mett sum ein drápsroynd móti einum løgreglumanni. Men enn er ov tíðliga at siga, hvussu ákæran kemur at ljóða. Hann leggur afturat, at málið eisini má metast sum eitt neyðarróp frá tí 25 ára gamla, sum upprunaliga ætlaði at taka lívið av sær sjálvum.